# Danmark kann røkka málinum

Danir kunnu røkka ST-málinum um at skerjua CO2-útlátið 90 prosent innan ár 2050, men treytin er, at teir leggja um til burðardygga orku burturav, sleppa teimum reyðu búffunum og fáa sær elbilar ístaðin fyri bensinbilar. Tað er í hvussu er niðurstøðan í einari frágreiðing hjá danska verkfrøðingafelagnum. Sambært verkfrøðingunum kunnu danir spara 13 milliardir krónur í 2015, tí avgjøldini á koli og olju minka. Sparingin fer at veksa støðugt og verður oman fyri 35 milliaqrdir krónur í 2050. Connie Hedegaard, ráðharri, er fegin um frágreiðingina, sum eftir hennara tykki kann halda.



# Ov fáar býráðskvinnur

Okkurt bendir á, at kvinnur í Mið- og Vesturjyllandi hava ikki so góðan hug at fáast við kommunupolitikk sum kvinnurnar aðrastaðni í Danmark. Hóast nógv fleiri kvinnur sita ín býráðunum nú enn fyrr, er hendan broytingin ikki komin til Herning, tí har eru bara fimm av teimum 30 býráðslimunum kvinnur. Samanumtikið eru bara 22 prosent av býráðslimunum í Mið- og Vesturjyllandi kvinnur, meðan meðaltalið fyri alt landið er 27 prosent. Danska kvinnufelagið vil hava ásett við lóg, hvussu stórur partur av einum býráði skal vera kvinnur. Líknandi skipanir eru í Noregi og Spania.

Nýggjar inntøkumetingar:

# Hallið verður 750 milliónir

**Spildurnýggjar inntøkumetingar hjá fíggjarmálaráðnum vísa, at hallið á fíggjarlógini í ár verður 250 milliónir størri enn roknað varð við, tá ið fíggjarlógin varð samtykt. Fremsta orsøkin til tað er, at føroyingar eru mestsum hildnir upp at brúka pengar**

HALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

*Hallið á fíggjarlógini í ár verður 250 milliónir størri, enn roknað hevur verið við og Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum sigur, at fyri at fáa skútuna aftur á beint, skulu bæði heilagar kúr drepast og kamelar slúkast*



Hallið á fíggjarlógini í ár verður 750 milliónir krónur.

Tað vísa tær feskastu inntøkumetingarnar hjá fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið hevur nú tikið samanum gongdina fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár og útfrá tí eru nýggjar metingar gjørdar um, hvussu inntøkurnar hjá landskassanum fara at vera í alt ár.

Metingin vísir, at henda ongar stórvegis broytingar, fer inntøkan hjá landskassanum at verða 247 milliónir minni í ár, enn mett varð, tá ið fíggjarlógin varð samtykt.

Upprunaliga varð mett, at fíggjarlógin í ár fer at geva eitt hall upp á 500 milliónir krónur.

Men sambært nýggjastu metingunum, fer hallið at verða heilt tætt við 750 milliónir krónur.

## Hildnir uppat at brúka pengar

Høvuðsorsøkin til afturgongdina er, at føroyingar eru at kalla givnir at brúka pengar.

Metingin hjá fíggjarmálaráðnum vísir, at a-inntøkurnar eru 3% lægri enn somu tíð í 2008.

Tó eru skattainntøkurnar bara 1% minni enn í fjør og tað kemst av, at í 2008 vórðu lætnir skattalættar, meðan eingin skattalætti verður latin í 2009.

Hinvegin vísir gongdin fyrsta ársfjórðing í ár, at føroyingar eru blivnir ógvuliga varnir at brúka pengarnar, teir forvinna.

Inntøkan hjá landskassanum av mvg og øðrum avgjøldum, er nevniliga nógv minni í ár enn hon var í fjør.

Soleiðis er inntøkan av mvg og øðrum avgjøldum 25% minni fyrsta ársfjórðing í ár, samanborið við fyrsta ársfjórðing í fjør.

Tó væntar fíggjarmálaráðið, at munurin fer at javna seg seinni í ár og at inntøkurnar hjá landskassanum av mvg og øðrum avgjøldum, verða góð 7% minni í 2009 enn í 2008 tá ið avtornar.

Tá fíggjarlógin í ár varð smíðað, varð roknað við eini inntøku upp á góðar 1,724 milliard í tolli og avgjøldum, men nú verður mett, at hendan inntøkan verður ikki meiri enn 1,595 milliard.

Inntøkan var mvg varð mett at geva 1,2 milliard, men hon fer at geva 80 milliónir minni og inntøkan av skrásetingargjaldi av nýggjum bilum, varð mett at geva 60 milliónir, men fer ikki at geva meiri enn 30 milliónir.

Harafturat vísir nýggja uppgerðin hjá fíggjarmálaráðnum, at inntøkurnar av partafelagsskatti skrambla niðureftir.

Á fíggjarlógini í ár varð roknað við 180 milliónum í partafelagsskatti, men nú verður mett, at inntøkan verður ikki meiri enn 110 milliónir.

Mett verður, at ein orsøk til tað eru teir ovurstóru skipahandlarnir, sum vórðu gjørdir fyri einum tveimum árum síðani og sum partafeløgini nú hava at dragast við.

Samanlagt verða allar inntøkur landskassans mettar at fara at verða góðar 360 mió. kr. minni í 2009 enn í 2008.

Men tá ið fíggjarlógin varð løgd, varð mett, at góðar 113 milliónir minni enn í fjør og sostatt verður inntøkan hjá landskassanum í ár 247 milliónir minni enn roknað varð við á fíggjarlógini.

# Heilagar kýr skulu drepast og kamelar skulu slúkast

**Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sigur, at mótbrekkan er brøtt og at tey ikki hava ráð til at heilagar kýr**

HALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Allar heilagar kýr skulu vigast og kamelar skulu slúkast.

So rámandi kann politiska avbjóðingin hjá samgonguni sigast á myndamáli.

Sum tað sæst í greinini omanfyri, vísa nýggjar metingar, at inntøkan hjá landskassanum verður einar 250 milliónir minni í ár, enn roknað varð við, tá ið fíggjarlógin varð samtykt.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður staðfestir, at mótbrekkan er brøtt og at tey politiska inntrivini, sum skulu gerast, fara at krevja eitt ómetaligt dirvi av Løgtinginum.

Hann sigur, at samgongan arbeiðir av kraft fyri at semjast um ein búskaparligan pakka sum skal fáa skútuna aftur á beint.

Men tað verður ikki fyrrenn Løgtingið fer í summarfrí hósdagin, at verulig gongd kemur á arbeiðið, tí tingarbeiðið fer við øllum kreftunum beint nú.

Hann sigur, at tað verður neyðugt at taka alvorlig stig fyri at fáa gongdina aftur á beint, tí hendir ikki ein avgerandi vend í búskapinum er tað so skjótt, at hallið á fíggjarlógini kann verða ein milliard næsta ár og tí er neyðugt at fáa tálma gongdini so tað munar.

## Fleiri treytir

Men í hesum arbeiðnum, eru tað fleiri treytir, sum skulu haldast.

- Yvirskipaða avbjóðingin verður at halda hjólunum malandi og at syrgja fyri, at fólk ikki missa arbeiðið og flýggja av landinum ella missa hús og heim, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Samstundis skal tað førast eitt neyvur og harður fíggjarpolitikkur fyri at fáa hallið á fíggjarlógini burtur.

- Men tað skal gerast uttan at nerva heilsuverkið, almannaverkið, skúlaverkið og aðrar grundleggjandi skipanir í einum vælferðarsamfelagi, staðfestir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Samstundis staðfestir hann, at tað tískil verður alneyðugt at hyggja eftir øllum postum á fíggjarlógini og at lúka burtur úr, uttan at ávirka tann grundleggjandi raksturin

Í hesum sambandi nevndir hann rentustuðulin til sethúsaeigarar, mvg stuðul til sethús, mvg stuðul til kommunurnar, sjómannafrádráttin og aðrar serskipanir, sum eru á fíggjarlógini.

Samstundis kunnu kanska onkur tiltøk gerast, sum virka beinanvegin, men hann vil ikki fara í smálutir?

## Ongar heilagar kýr

Hann er greiðir yvir, at summi av hesum málum eru heilagar kýr hjá summum flokkum og summum politikarum.

- Men í teimum politisku avgerðum, vit skulu taka í næstu framtíð, hava vit ikki ráð til at hava heilagar kýr og tað er eisini greitt, at kamelar skulu slúkast.

Bæði Kaj Leo Johannesen, løgmaður og Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, hava staðfest, at almennu útreiðslurnar kunnu ikki veksa eina krónu næsta ár?

- Seinastu árini eru útreiðslurnar vaksnar nógv og tí má yvirskipaðu málsetningurin vera at reka føroyska samfelagið fyri sama prís næsta ár, sum tað kostar í ár.

Men nú er tað greitt, at lønirnar hækka 3% næsta ár. So antin mugu almennu útreiðslurnar hækka, ella mugu sparingar setast í verk?

- Tað havi eg ikki so nógvar viðmerkingar til. Høvuðsendamálið er at útreiðslurnar skulu ikki hækka, men hvussu vit koma hartil, er ein spurningur um politiskt handalag og, hvørja politiska semju, vit fáa í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Kann tað hugsast, at skattur og avgjøld fara at hækka?

- Sum støðan er nú, kann alt hugsast!